# Skelkaðar kvinnur umborð á Gongurólvi

**- Tað snúði seg um eina lítla løtu, har eg siti og tosi við mína manning og tískil ikki hyggi út. Tað næsta eg síggi er ein maskinbátur, sum kemur beint ímóti okkum, sigur róðurskvinnan á Gongurólvi, Maria Trygvadóttir**

KAPPRÓÐUR
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*



*Tað var undir upphiting, meðan barnaróðurin fór fram, at samanstoyturin millum Gongurólv og ein maskinbát hendi*

*Mynd: Álvur*



Kvinnurnar á Gongurólvi fingu ein skelk á Fjarðastevnu, tá tær vórðu árendar av einum maskinbáti.

- Summi siga, at vit lógu inni á feltinum, meðan onnur siga tað øvugta. Men eg haldi ikki, at vit lógu inni á feltinum, sigur Maria Trygvadóttir.

Tær vóru í gongd við at rógva málið av á Skála, tá óhappið hendi. Vanligt er, at ein manning gjøgnumgongur, hvussu málið á einari stevnu skal rógvast, áðrenn sjálvan róðurin. Og tað var hetta, sum kvinnumanningin á Gongurólvi var í ferð við.

Maria sigur, at tær sótu og tosaðu um, hvar endaspurturin skuldi byrja, tá hon varnast, at ein maskinbátur kemur ímóti teimum.

- Alt hendi so skjótt, at tað einasta eg minnist er, at hasin báturin kemur skúmandi ímóti okkum. Onkur rópti bakborð, so eg stýrdi í bakborð, men tá fór maskinbáturin eisini í bakborð. So skiftu vit til stýriborð, og teir fara sama veg, og tá rendi hann so á okkum. Hetta snúði seg um nøkur sekund, so eg veit ikki, um vit kundu havt gjørt nakað fyri at hindrað samanstoytinum, greiðir róðurskvinnan á Gongurólvi frá. Hon heldur fram, at hon veit ikki, hvør hevur víkiskyldu á sjógvinum undir slíkum umstøðum.

- Sjálvandi kann ein seta spurnartekin við, hví eg ikki hugdi út, men hatta var kleyvarskapur, tí har vóru heilir fýra mans umborð á maskinbátinum, og ongin av teimum hugdi út, sigur hon avgjørd.

## Spara bátin

Kvinnurnar á Gongurólvi verða kortini við á Vestanstevnu, men tær hava gjørt av at fara við Víkingi.

- Tað gera vit fyri at spara bátin, tí menninir hava jú møguleika til at gerast føroyameistarar, so teir skulu helst kunna brúka bátin, vísir hon á.

Sum Maria hevur skilt, er ætlanin at tetta Gongurólv sum frægast við silikoni og so nýta hann hetta kappingarárið út. Hvat síðani hendir, veit hon onki at siga um.

- Men vit hava so fingið undantaksloyvi at rógva sum Gongurólvur á Vestanstevnu við Víkingi. Annars sleppa vit ikki við á Ólavsøku, greiðir Maria Trygvadóttir frá.

Tað kemst av tí, at Gongurólvur bert hevur luttikið á tveimum stevnum higartil í ár, og ein bátur skal hava róð minst tríggjar FM stevnur fyri at kunna luttaka á Ólavsøku.

---

## Úrslit frá Fjarðastevnuni 2005

**Alvaróður dreingir**
1 Royndin Fríða 02:29.15
2 Havfrúgvin 02:29.19
3 Jomfrúgvin 02:30.11
4 Fípan Fagra 02:32.03
5 Sílið 02:38.06
6 Ritan 02:40.15
7 Dúgvan 02:41.04
8 Tarvurin 02:47.05
9 Falkur 02:54.14

**Alvaróður gentur**
1 Ørnin 02:34.14
2 Hvassi 02:35.20
3 Firvaldur 02:36.06
4 Tekla 02:36.17
5 Drekin 02:36.20
6 Dúgvan 02:38.17
7 Royndin Fríða 02:39.22
8 Falkur 02:56.16

# Fjarðastevna – píl uppeftir

**Fyriskipanin av kappróðrinum hetta kappingaárið hevur fingið nógva umtalu – negativa umtalu. Men eftir Fjarðastevnuna er tíð uppá, at kappróðurin fær píl uppeftir**

KAPPRÓÐUR
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

Loksins eydnaðist tað at fáa allar róðrarnar avgreiddar innan fyri hálvan triðja tíma. Aftan á Varmakeldu segði kappingarleiðarin hjá RSF, Hans Dávid Hansen, at tað hevði verið gott, um hálvur tími afturat kundi fílast av tíðini.

Tað eydnaðist á Skála leygardagin. Klokkan var ikki farin langt av trý, tá fyrsti róðurin fór í gongd. Og stutt áðrenn hálvgum seks kundi máldómarin skjóta fyri seinasta tíggjumannafarinum, sum kom á mál.

Karmarnir á Skála leygardagin vóru av teimum allarbestu, og hartil var veðrið av tí fagrasta. RSF hevði útvegað sær tveir startir. Ein lá á 1.000 metrum og ein á 1.500 metrum. Og alt eydnaðist til fulnar, tá tann eini starturin skuldi flytast út á 2.000 metra málið.

Kjakið hevur gingið lívliga um, hvørjar orsøkirnar eru til, at kappróðurin tekur so langa tíð at avgreiða. Summi geva barnaróðrunum skyldina, so teir eru lagdir áðrenn sjálvan FM róðurin. Onnur geva fyrireikarunum ella RSF skyldina, meðan uppaftur onnur siga, at veðrið hevur alt at siga. Hvat av hesum tað kann vera, skal her vera ósagt, men ongin ivi er um, at á Skála var alt væl fyrireikað, veðrið var gott, barnaróðrarnir vóru lidnir klokkan hálvgum trý og kappróðurin á Fjarðastevnu var liðugur, áðrenn klokkan var hálvgum seks.



*Alt klappaði á Fjarðastevnu, og flest øll mundu vera glað og vælnøgd eftir kappróðurin*

*Mynd: Álvur*

Óhapp kunnu altíð henda, tá eitt so stórt tiltak skal fyriskipast, sum kappróðurin í Føroyum nú er blivin. Sjey FM róðrar – umframt barna-, old girls og boys róðrar - og startar, sum skulu flytast. Men nú eru bert tvær stevnur eftir, og báðar hava bert 1.000 metra teinar, so um hugsað verður um, hvussu skjótt tað gekk á Skála, so er tað lætt at vera bjartskygdur um bæði Vestanstevnu og Ólavsøku.